tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Nú mugu politikar- ar taka seg saman

*Oddagrein*

VIT hava nú í eina tíð hoyrt og lisið um torføru og syrgiligu støðuna hjá Strandfaraskipum Landssins. Stovnurin, sum meira enn nakar annar almennur stovnur verður brúktur í tí politiska ping-pong spælinum, stendur nú á einum álvarsligum og vandamiklum vegamóti, fyri ikki at siga gravarbakkanum. Skipini sleppa skjótt ikki at sigla longur, tí trygdin er ikki í lagi. Undantøkini hava hópað seg upp, men nú ber ikki longur til at útseta tørvandi og lívsneyðugar ábøtur og umvælingar fyri ikki at siga heilar skipaútskiftingar.

VIT minnast øll, hvussu undanfarni stjórin royndi at fáa fleiri midlar til stovnin, soleiðis at hann kundi lúka nútíðar tørv og krøv. Og nú endurtekur søgan seg og hoyra vit verandi stjóran rópa neyðarróp, men tað tykist ikki sum nakar hoyrir hann, hóast nettupp løgtingsmenn - fyri ikki at tala um landsstýrismenninar - áttu at verið tey fyrstu at innsæð, hvussu álvarslig støðan er. Kanska nettupp Strandferðslan er tann almenni stovnurin, sum allir landsins borgarar minst kunnu vera fyriuttan. Tí átti tað at verið ein sjálvfylgja, at hesin stovnurin heldur enn at verða spardur í hel fekk tær játtanir, sum eru neyðugar fyri at kunna virka bara so nøkunlunda. Herfyri bað SL um loyvi at hækka prísin á ferðaseðlum eftir at løgtingið við undirtøku úr Tinganesi hevði sýtt fyri at hækka játtanina til stovnin. Hetta var kortanei. Nú skal Smyril skjótt í dokk, og í hesum sambandi skal leigast annað skip. men heldur ikki tað eru pengar til. Vit skilja støðuna hjá bæði fyrrv. stjóra og tí verandi, sum hava havt eina nærum ómøguliga uppgávu at røkja.

TAÐ er nú uppá tíðina, at tingmenn taka seg saman og at landsstýrið heldur uppat leggja fótonglar fyri almennum stovnum, soleiðis at teir verða ambuteraðir. Her kunnu vit eisini nevna sjúkrahúsini. Tað sigur seg sjálvt, at okkurt ruggar ikki rætt, tá tingmenn fyrst nokta SL tær játtanir, sum eru neyðugar fyri at fasthalda og betra um tænastuna - fyri harnæst at krevja av sama stovni, at hann skal varðveita og betra verandi tænastustøði. Annars skilja vit ikki landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum við sínum stranga fíggjarpolitikki er við til at syndra og undirgrava okkara mest týðandi almennu stovnar. Herfyri rósti hann sær av, at landsstýrið hevði lagt eina milliard til síðis. Samtíðis hevur hann lagt kvørkratak um týðandi almennar stovnar, sum við bit og slit hava ment seg. Heldur landsstýrið fram á henda hátt tekur landsstýrið teppið undan sínum fullveldisætlanum.

*Sosialurin*

Viðmerking:

# Leiðslan í Sambandsflokkinum - ein forðing fyri menning

Í seinastuni hava leiðarnir og teirra viðhaldsfólk í Sambandsflokkinum verið so dúgligir at skriva í bløðini. Skrivingin er helst ætlað sum eitt íkast í fullveldiskjakið, men er meira átøk runukasting.

Og sum sambandsmaður heldur man seg fáa ógvuliga lítið fóður hendavegin, tí skrivingin hjá sambandsleiðarunum gongur mest út upp á at fortelja javnaðarmonnum, hvat ið teir áttu at gjørt ella skulu gera. Ógvuliga lítið - fyri ikki at siga einki - um, hvat ið Sambandsflokkurin hevur at lata fyri at loysa hesar trupulleikar, sum hann sjálvur hevur verið við til at leggja støði undir.

Soleiðis var um dagarnar ein grein, sum reisti spurningin um støðufesti er tað sama sum at fara í baklás. Svarið er helst ja, tá ið tað snýr seg um ein part av Sambandsflokkinum, men í staðin fyri at svara hesum áhugaverda og kanska eitt sindur filosofiska spurningi, so velur greinskrivarin at viðgera Javnaðarflokkin úr einum enda í annan av greinini.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava í hvussu so er tað felags, at teir eru ríkisfelagsskapsflokkar og áttu tí sum soleiðis eisini at kunna drigið eina línu í hesum spurningi. Teir eru samdir um, hvat ið markið gongur. Teir eru langt á vegnum eisini samdir í búskaparligum, sosialum, vinnuligum og mentunarligum málum og skulu tí heldur ikki hava trupulleikar í at arbeiða saman á hesum økjum.

Eins og aðrir flokkar hevur Sambandsflokkurin gjørt sítt uppskot til hvussu okkara ríkisrættarligu viðurskiftir skulu vera framyvir. Hetta varð sent í húsini í sinari tíð og so heldur man, at alt er sára gott. Einki uppfyljgandi arbeiði ella fundarvirksemi fyri at greiða nærri, bert okkurt hissini róp frá onkrum tingmanni um, at nýskiparnaruppskotið er loysnin.

Í staðin fyri at nýta alla sína orku uppá at egleiða Javnaðarlokkin átti leiðslan í Sambandsflokkinum áhaldandi at greitt frá, hvat ið liggur í sambandsuppskotinum og hvat ið Sambandsflokkurin vil. Men her er steindeytt. Sjálvur kann eg taka undir við hvørjum stavi í hesum uppskotinum nevnt Nýggjar Tíðir, men ávirkanin úti í samfelagnum er millum lítil og eingin, tí eingin frá leiðsluni fylgir hesum upp.

Sjálvur var eg sum tingmaður longu í 1995 við til at royna at fáa í lag eina viðgerð av hesum fyri sjálvir at seta dagsskránna fyri viðgerðina av ríkisfelagsskapsviðurskiftunum. Sjálvt um vit helst vóru ein meiriluti í tingbólkinum, sum hevði hug at fara undir at viðgera hesi mál, so var tað bannað av leiðsluni at taka nógv av hesum, sum nú verður skotið upp, upp á tunguna og tann nógv umrøddi servietturin varð alt fyri eitt havdur á lofti, um onkur vágaði sær.

Vit høvdu eisini tá møguleikan fyri at taka undir við einum javnaðaruppskoti um at seta niður eina nevnd til at kanna møguleikarnar fyir at seta eina nevnd at kanna tey ríkisrættarligu viðurskiftini - ein sokallað stjórnmálanevnd. Hevði Sambandsflokkurin tikið undir við hesum uppskoti, so høvdu tenninar verið trektar úr øllum fullveldistosi í nógv ártíggir framyvir, tí so hevði ríkisrættarspurningurin verið viðgjørdur í ríkisfelagsskapshøpi og ikki sum ein spurningur um fullveldi ella ikki. Men gakk. Servietturin kom upp og har var einki at gera, sum samgongan skuldi halda áfram.

Í staðin varð Sambandsflokkurin nú drigin eftir hárinum til at koma við onkrum sum tann síðsti av øllum flokkunum. Tá var kósin longu sett av hinum flokkunum og ávirkanin hjá



Sambandsflokkinum gjørdist minimal eins og hon framvegis tykist at vera.

Eg royndi í eini grein í heyst at vísa á, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin við øllum tí, sum teir hóast alt eru felags um, eig at finna saman um at senda boð eftir Fólkaflokkinum, tí við hesum trimum flokkunum sum grundarlag kundi tað sæð út til, at man kann fáa tað breiðastu og longst varandi semjuna á ríkisrættarliga spurninginum. Men henda møguleikan tykist Sambandsflokkurin at leggja gift fyri við sínum áhaldandi álopum á Javnaðarflokkin. Eg meti ikki, at leiðslan hevur baklandi við sær í hesum - og tað so langt frá. Og um eg havi rætt í tí, ja, so eigur okkurt at vera gjørt á komandi landsfundi í Sambandsflokkinum fyri at skifta leiðsluna út, so hon ikki longur er ein forðing fyri at vit fáa ta fyri flokkin bestu loysnina á ríkisrættarliga økinum.

Men ein skal helst vera varin við at koma við tílíkum uppskotum, tí av verandi leiðslu verður hetta at skjóta onnur valevnir upp skýrt sum kvett, hóast formansval er fast punkt á skránni til landsfundin. Í øðrum flokkum kalla tey tað demokrati. Og fókafloksskrímslið verður hálað so framaftur sum tann besta verndin fyri verandi leiðslu.

Tann, ein elska tyktar hann. Tað er út frá heusm eg kortin ifari at ditta mær til at heita á sambandfólk um at umhugsa henda spurningin og alment at viðgera hann. Sambandsflokkurin hevur so nógv sterkt at byggja á, at hann eisini skal tola eitt alment orðaskifti um hesar spurningar. Tað er eisini neyðugt, at tað verður gjørt alment, tí tað er ikki einum og hvørjum beskorið at koma upp ígjøgnum verandi floksleiðslu við slíkum falstrúartonkum. Og hetta er stórt spell fyri tær nógvu góðu yngri kreftirnar, sum vóru á veg í flokkinum, men stórt sæð eru sovnaðar aftur - køvdar av afturhaldsmyrkri.

Mín niðurstøða er, at verandi leiðsla er ein stórur meinbogi m.a. fyri at finna loysnir á ríkisrættarliga økinum. Hon forðar eisini fyri loysnum á øðrum økjum. Tí eigur hon at vera skift út og onnur, ið røkja áhugamál floksins betri, at vera sett í staðin.

Higartil hevur leiðslan í Sambandsflokkinum verið ein gáva til fullveldisætlanina. Hetta eigur at verða broytt t.d. við at velja eina aðra leiðslu á komandi landsfundi hjá Sambandsflokkinum, sum er síðst í mars mánaða. Hetta eigur at verða gjørt við einum sakligum orðaskifti bæði alment og á landsfundinum og uttan at ljót orð verða kastað eftir teimum, sum stilla onnur valevnir upp ella eftir sjálvum valevnunum.

Sambandsflokkurin átti at verið sentralur í viðgerðini av teimum ríkisrættarligu viðurskiftunum. Landsfundurin eigur at syrgja fyri, at flokkurin aftur fær henda leiklut.

Gøtu 31.01.2000
**Atli Hansen**

# Laksaprísurin enn hægri í ár

Árðið í fjør var eitt gott ár hjá alivinnuni. Nøgdirnar eru vaksnar ár frá ári, sjúkutrupuleikarnir hava veri minkandi, og seinasta ársfjórðing í 1999 vóru prísirnir á laksi metgóðir.

Á laksa-døgunum, sum í farnu viku vóru í Trondheimi spáddi Lars Liabø, at prísirnir í ár í miðal fara at liggja 1 krónu omanfyri árið í fjør.

Lars Liabø frá Kontali, gerð hagtøl og kanningar innan aling og hann var fyri stuttum í Føroyum og helt ein fyrilestur. Fáður kennir meira til gongdina innan alingina enn hann, so tá Lars spáar um gongdina, plagar hald at vera í, skrivar Vinnuhúsið.

**2 kr. hægri**

Lars Liabø væntar, at prísirnir 1. hálvár 2000 fara at liggja um 2 kr hægri enn í fjør, meðan prísgongdin seinra hálvár verður meira lík 1999. Eisini metir hann, at sølan av laksi kann økjast út yvir prísin.

Í Noreg hevur gongdin verið, at alararnir hava havt størri inntøkumarginalar, meðan sølufyritøkurnar hava havt minkandi inntøkur pr. kg. Í 1999 var inntøkumarginalurin hjá sølufyritøkunum 1,96 Nkr pr. kg, meðan hann var 2,18 árið fyri.



# Tingbólkarnir skulu kunnast um uppritið

*Formaðurin í uttanlandsnevndini heldur tað vera sjálvsagt, at limir nevnd-arinnar kunna tingbólkar sínar um uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar*

JOHN JOHANNESSEN

– Hergeir Nielsen hevur nú, sum formaður í uttanlandsnevndini, fulla ábyrgd av uppritinum til samráðingarnar við donsku stjórnina. Tí er tað eisini hann, ið ger av, hvør skal kunnast um uppritið.

Hetta er svarið frá løgmanni, tá vit spyrja hann, um hann hevur tikið støðu til fyrispurningarnar frá andstøðulimunum í uttanlandsnevndini, um í hvønn mun teir kunnu kunna tingbólkar sínar um málið.

Formaðurin í uttanlandsnevndini heldur tað vera sjálvsagt, at limirnir í uttanlandsnevndini leggja innihaldið í uppritinum fyri flokkarnar. Men hann heldur kortini stóran mun vera á at kunna flokkarnar um innihaldið og at lata aðrar limir í flokkunum, enn limirnir í uttanlandsnevndini kaga í ritið.

**Mugu kunnast**

Hergeir Nielsen ásannar, at málið um ríkisrættarligu støðu Føroya er eitt ógvuliga týdningarmikið mál, og tí ber ikki til hjá limunum í uttanlandsnevndini at taka støðu til málið, uttan at ráðføra seg við flokkar sínar.

Men Hergeir Nielsen heldur tað kortini framvegis vera skeivt, um aðrir limir í flokkunum, enn uttanlandsnevndarlimirnir, sleppa at lesa uppritið.

– Talan er í løtuni um at leggja eina strategi í einari ætlan ímillum tvey lond, og tí er tað ógvuliga týdningarmikið, at fólk virða hugskotini frá landsstýrinum, sum standa í uppritinum. Fólk eiga at virða trúnaðarstemplið, sigur hann.

– Talan er um eitt mál, ið landsstýrið metir vera so mikið álvarsamt, at tað skal viðgerast í trúnaði. Hesa meting taki eg til eftirtektar, og fari eg ikki at bróta ta álit, ið er givið mær í hesum máli, við at lata onnur enn limirnar í uttanlandsnevndini síggja ritið.

Kortini staðfestir formaðurin í uttanlandsnevndini, at tað er í sjálvsagt, at limir nevndarinnar kunna og ráðgeva seg við flokkar sínar um uppritið, áðrenn teir taka støðu í málinum. Men hann leggur stóran dent á, at munur er á at kunna um málið og at lata onnur lesa ritið.

**Skilir ikki grundgevingarnar**

Formaður Javnaðarfloksins hevur somuleiðis, sum Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins, víst á, at neyðugt er at ráðføra seg ið tingbólkarnar um hetta álvarsmál. Og hann heldur, at fyri tað skal bera til at ráðføra seg, er neyðugt, at tingbólkarnir sleppa at síggja ritið.

– Eg síggi onga meining í, at vit bara skulu práta við tingbólkar okkara um málið, uttan at hava nakað at tosa út frá. Hetta ber jú ikki til. Tískil vóni eg, at vit fara at fáa loyvi at lata tingbólkarnar sleppa at síggja innihaldið í ritinum, sigur Jóannes Eidesgaard og leggur afturat, at tað verður ein væl fyrireikaður Javnaðarflokkur, ið fer at viðgera málið um ríkisrættarligu støðuna.



*Hergeir Nielsen, formaður í uttanlandsnevndini, heldur tað vera sjálvsagt, at tinbólkarnir verða kunnaðir um uppritið, men hann heldur ikki, at teir skulu sleppa at lesa tað*

**Megnar arbeiði**

Hergeir Nielsen sigur seg vera fegnan um, at tað nú er komið so langt í málinum um ríkisrættarliga spurning Føroya, at uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina nú eru komnar í uttanlandsnevndina til viðgerðar.

– Landsstýrið hevur gjørt eitt megnar arbeiði í hesum máli. Nógv góð hugskot eru komin á borðið, og eg fegnist um ta stóra arbeiðið, Høgni Hoydal hevur lagt í hetta mál. Hann hevur verið tann stóri arbeiðshesturin, ið hevur staðið aftanfyri løgmann undir allari viðgerðini, sigur Hergeir Nielsen.

Uttanlandsnevndin hevur fund um samráðingaruppritið mikumorgunin. Hetta verður fyrsta ferðin, nevndin fer at viðgera uppritið.

Hergeir Nielsen vil sjálvsagt einki siga um innihaldið í uppritinum, men hann váttar, at tað av innihaldinum, ið higartil er likið út, er rætt.

# Javnaðarflokkurin á landsfund um sjálvstýrismálið

*Javnaðarflokkurin gjørdi á floksleiðslufundi um vikuskiftið av, at haldast skal ein eyka landsfundur fyrsta dagin um ríkisrættarliga spurningin*

JOHN JOHANNESSEN

Um vikuskiftið hevði Javnaðarflokkurin floksleiðslufund, har spurningurin um viðgerðina av ríkisrættarliga spurninginum var til viðgerar.

Á hesum fundi varð gjørt av at hala ein eyka landsfund í Havn í hesum mánaðinum, har eittans mál skal vera á dagsskránni. Málið verður ríkisrættarligi spurningurin.

Meingin við landsfundinum er, sambært formanni floksins, at vanligu limirnir í Javnaðarflokkinum skulu sleppa at gera vart við sína hugsan um hetta álvarsmál. Eisini ætlar leiðslan í Javnaðarflokkinum sær at brúka nógva orku uppá at kunna limirnar um sína greiðu støðu til viðgerðina av sjálvstýrisspurninginum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur tað vera eina heilt náttúrliga uppgávu fyri at tryggja fólkaræðið, at Javnaðarflokkurin letur limir sínar koma fram við sínum sjónarmiðum í einum slíkum álvarsmáli.

Spurdur, um Javnaðarflokkurin heldur hendan landsfundin fyri javna út ósemjur í flokkinum sjálvstýrismálinum, svarar Jóannes Eidesgaard, at ongar slíkar ósemjur eru.

# Nyrup tegir

*Danski forsætisráðharrin vil einki siga um tað, sum er komið fram um uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar*

JOHN JOHANNESSEN

Eins og í Føroyum eru í Danmark í løtuni fyrireikingar til samráðingar um støðu Føroya í danska ríkinum.

Danir leggja stóra orku í at kunna seg um tað, sum fyriferst í Føroyum í løtuni, og áhugin er stórur fyri tí tilfari, føroysku fjølmiðlarnir finna fram um uppritið, landsstýrið hevur latið uttanlandsnevndini til viðgerðar.

Men danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, vil als einki siga um tað, sum fyriferst í Føroyum í løtuni. Hann er eins fámæltur, sum føroysku pol-



itikararnir eru í løtuni, tá tosað verður um samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna.

Poul Nyrup Rasmussen vil heldur einki siga um, hvussu danir fyrireika seg til samráðingarnar, men sum skilst, eru fyrireikingarnar farnar í gongd.






...úr Føroyum 7. juli, 21. juli og 4. august

14 dagar undir sólini

**Costa Dorada**

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis við Atlantic Airways úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað stórsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.

PRÍSDØMI:
Hotel Michelangelo
**+, 2 fólk
Íroknað er:
Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



8.900,- pr. pers.

PRÍSDØMI:
Hotel Europa
***, 2 fólk
Íroknað er:
Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



9.100,- pr. pers.

PRÍSDØMI:
Hotel Estival Park
****, 2 fólk
Íroknað er:
Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



10.250,- pr. pers.

• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum
Kom inn og hoyr nærri...

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870